

T.v. handilin hjá Hans í Fjósi í Bringsnagøtu



Her búði Hansina og hevði eisini viðtalu



Fía, dóttir Tummas og Hansinu, Magnus og dóttirin Kamilla

oyum, nógv færri enn lógin ásetir. Lønin er alt ov lítil. Hetta ger sítt til, at áhugin fyri starvinum er so lítil.

Økisjarðarmøðurnar í Havn fáa hvør 80 kr árliga í løn í Havn, meðan hon er lægri úti á bygdunum. Har er hon kr. 60 árliga, um tær hava fingið útbúgving, annars er hon kr. 40. Eftir 15 ár fáa tær kr. 20 afturat. Eftir samanhanginum at døma má hetta hava verið grundlønin.

Tað er eitt minstagjald uppá 2 kr fyri sjálva føðingina og 50 oy fyri hvønn dag jarðarmóðurin er hjá føðandi kvinnuni. Hetta kann geva 10 kr. í miðal fyri hvørja føðing.

Annars var tað upp til familjuna hjá barninum, hvussu nógv tey vilja lata í samsýning. Tað kom eisini fyri, at eingin samsýning var latin, tí ráðini ikki vóru til tess, ella tí fólk hildu, at jarðarmóðurin fekk sína føstu løn. Men tey takka so hjartaliga fyri hjálpina.

**Hansina:** Det har også sin betydning for Jordemødrene vedkommende, da vi tit trænger til gode Menneskers Forbønner, mens vi ser Liv og Død række hinanden Haand, og vi selv paakalder ham, som ene kan hjælpe, naar Menneskers Hjælp ikke foreslaar. Jordemødrene faar i Sandhed at vide, at Livet ikke altid er saa lyst for en del Mennersker, og er der nogen, som kan forstaa til fulde, hvad Sygdom og Sorg kan bevirke i et Hjem, saa er det en Jordemoder.

### Umstøðurnar eru versnaðar

**Umstøðurnar er vánaligar hjá jarðamøðrum. Tað eru bert fáir løgtingsmenn sum skilja hetta. Hansina heldur fram:**

I 1878 kunde Jordemødrene holde sig hele og rene, om ikke standsmæssigt, det var Lønnen dengang ikke tilstrækkelig til. Efter 1900 maatte man for at efterkomme Uddannelsesordrerne knibe af Mandens Fortjeneste for at kunde være rene om end tarvelige i Tøjet. Senere har det vist sig vanskeligere at skaffe det nødvendigste til Livsophold m.m., og under de nuværende Forhold kan de fleste Jordemødre med deres bedste Vilje ikke holde sig rene og uberørte af forskellige Ting i eller udenfor Hjemmet, som Jordemoderen burde være fri for.

Hansina vísir eisini á, at tað kostar 300 til 360 krónur árliga at hava eina arbeiðsgentu umframt mat og vask, og hetta hava jarðarmøðurnar ikki ráð til. Hetta kann føra til øktan vanda fyri barsilsfepur hjá kvinnuna og stívkrampa hjá barninum.

Tískil spyrja jarðarmøðurnar, um Føroyar hava ráð til at missa sínar føðandi kvinnur, ella børnini sínar mammur, tá ið sleppast kann undan tí.

### Taka sær av "usædelig liv"

Tingakrossur sigur jarðarmøðurnar ofta hava ringan anda. Hansina sigur hetta kemur av, at tær ofta gerast sjúkar í maganum av sínum arbeiðsumstøðum, og so leggur hon afturat: "Jordemødrenes ildelugtende Aande, hidrører ikke fra en Mave, fordærvet ved overdreven Nydelse af Alkohol eller erhvervet ved Sygomme, fremkaldt ved et usædeligt Liv. Er der noget vi Jordemødre afskyer, saa er det et usædeligt Levnet. Men Skæbnen føjer det altfor tit saadan, at Jordemoderens Nærværelse paakræves i Slutningsakten af andres usædelige Liv, og de stakkels uægte Børn arriverer, de fleste for at gaa en tvivlsom Skæbne i Møde. Men Libertinerne fortsætter paa Jordemødrenes og andres Bekostning.

### Djór meira vird enn børn

Samlaða byrjanarlønin hjá øllum økisjarðarmøðrum er kr. 1.140. Til sammetingar hava Føroyar nú fingið ein djóralækna. Hesin fær einsamallur kr. 2.000 árliga í grundløn, og hetta kann ikki sigast at vera ov nógv. Men umframt hetta fær hann kr. 2.400 fyri viðtalur. Hetta er tilsamans ein góð inntøka. Hægsta inntøkan, Hansina hevði havt, var í 1916, tá ið hon tilsamans fekk kr. 700 fyri 59 føðingar. Tað var bert á Tvøroyri, at jarðarmóðurin fekk meira. Men útreiðslurnar til klæðir, skógvar og annað vóru meira enn hetta.

At Hansina kortini hevur kunnað klára seg er fyrst og fremsta takkað verið, at maður hennara eftir føroyskum viðurskiftum hevur eina góða inntøku. Umframt hevur hon eina góða heilsu, og so hevur elsta dóttir hennara verið til stóra hjálp undanfarnu átta árini. Tað vóru kanska tey, sum hildu, at sum dóttir av húsinum nýttist henni onga løn, men tað heldur Hansina als ikki kunna bera til.

Hansina heldur, at henda sammeting vísir, at djórini eru meira vird í Føroyum enn børnini.

Løgtingið var við at viðgera umstøðurnar hjá jarðamøðrum, og hon kemur við ítøkiligum uppskoti um eina skipan nýskipan, m.a. við ferðasamsýning til jarðarmøðurnar.

Umstøðurnar vóru nógv betri í Danmark, so tað er ein stórur vandi fyri, at ógiftar jarðarmøður søkja hagar, sum umstøðurnar eru bestar.

### Niðurstøðan hjá Hansinu

Ved at skildre ovenstaaende, som for Øernes Skyld til evige Tider burde være skrinlagt, da det kun daarligt taaler Dagens Lys, har jeg indfriet et før givet Løfte.

Hon heldur tað vera óheppið, at henda skommin eisini kemur út um landamark, tá Dimmalætting eisini verður lisin í Danmark, men:

"herfor kan vi takke Redaktøren af Tingakrossur, som med sin utidige, uvidende og ukorrekte Fremstilling af Sager, hvilket ogsaa gælder Jordemodersagen, har søgt at fremkalde den største Uvilje blandt Befolkningen mod Jordemødrene og selvfølgelig specielt imod mig.

Jeg kan forsvare enhver af mine Handlinger og vil stadig virke for Befolkningens Bedste.

Hvorvidt færøske Jordemødre herefter vil pryde eller mispryde den Stand, de hører til og det Land, de arbejder for, samt hvor mange fødende Kvinder eller Jordemødre paa Grund af den nuværende yderst uretfærdige og uforsvarlige Ordning, som udelukkende skyldes Myndighedernes Forsømmelse, skal dø en for tidlig Død, staar alt sammen i Regeringens, Lagtingets og de kommunale Myndigheders Hænder.



Hans Olaf Hansen, sonur Tummas og Hansinu, sum í nógv ár var stjóri á Føroya Vanlukkutrygging

**Komandi partur:**

Í komandi parti verður greitt frá Rasmus Olsen. Hann var ættaður úr Søldarfirði, men búði stóran part lívinum í Stockholm